BLÓMUR

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos
**MYNDIR:** JENS KRISTIAN VANG

# Blómur lívga og prýða heimið

VILT TÚ HAVA LÍV OG LITIR INN Í HEIMIÐ, KANST TÚ SETA TÆR SUM MÁL, ALTÍÐ AT HAVA EITT **BLÓMUTYSSI** STANDANDI Í EINUM VØKRUM VASA. VIT HAVA SPURT **LINDU OLSEN**, BLÓMUBINDARA, HVUSSU VIT FÁA RÓSUNA, LILIUNA OG VINKONUR TEIRRA AT **TRÍVAST** SUM BEST HEIMA Í STOVUNI



**Anthurium**
Modernað blóma, sum heldur sær upp til ein mánað. Trívist ikki í beinleiðis sólarljósi, men væl í heitum rúmum.



**Liljan**
**Liljan merkir:** Eg eri bergtikin av tínum vakurleika.
Liljan er ein dýr blóma – 40 krónur fyri hvørja er ikki óvanligt. Men so heldur hon sær eisini heilt upp í tvær vikur. Ansa eftir ikki at koma undir sáðberan, tí liturin fæst illa úr aftur klæðunum. Um óhappið kortini hendir, skalt tú ikki griggja, men brúka tape at fáa dustið burtur við.



**Amaryllis**
**Amaryllis merkir:** Vakurleiki
Traditionell jólablóma, sum eisini verður brúkt í blómutyssum. Er sera kostnaðarmikil, kostar ofta einar 100 krónum fyri hvørja. Amaryllis heldur sær longri enn eina viku, um vatnið er friskt.



**Rósan**
**Reyð rósa merkir:**
Eg elski teg.
**Hvít rósa merkir:**
Far ongantíð frá mær.
**Ljósareyð rósa:**
Okkara kærleiki er altíð ungur.
Rósan er ein viðbrekin blóma. Tí skal hon hava góðar umstøður fyri at trívast. Rúmið skal vera svalligt og vatnið friskt. Ætlar tú at para rósuna við øðrum blómum, skulu hesar ikki vera ov stórar og krevjandi, tí rósan fyllir so nógv í sjálvum sær.



**Gerbera**
Vælumtókt blóma, ið fæst í 500 ymiskum sløgum og nógvum litum. Vatnið skal ikki koma ov høgt upp, tí so rotnar loðni stelkurin.



**Krysantemum**
**Hvít krysantemum merkir:** Sannleiki.
Krysantemum er heystblóma. Tað eru omanfyri ymisk 200 sløg til, og hon heldur sær leingi. Vatnið skal ikki koma ov høgt upp, tí so rotnar hin loðni stelkurin.

**Avskornar blómur**
- Vaska vasan væl, áðrenn tú setur blómurnar í
- Set blómurnar í kalt vatn
- Skift vatnið annanhvønn dag
- Tað skal ikki vera ov heitt inni
- Um tað er heitt inni, kanst tú seta blómurnar í hjallin um náttina

Fyri at javnvág skal vera millum vasa og blómutyssi, skalt tú hugsa at lutfallið skal vera 3 til 5. Hetta er eisini lutfallið, sum arkitektar og onnur skapandi brúka, fyri at fáa eina vakra heild.

Hugsa í pyramiduskapi, tá tú skipar blómurnar.

**Kelda:** Linda Olsen, Alfaidaga